

# STEVNUBLAÐIÐ – SUNDALAGSSTEVNAN 2008


**24 nýggj grundøki**
Síða 3

**Thor byggir nýggja havn**
Síða 5

**Nýggjur skúli**
Síða 5

**Søgan um Golden Harp**



Síða 14-15

**Kappróður er hæddar-punktið**
Síða 5


# Taka hendur saman um sundalagsstevnu



Í ár eru tað hósvíkingar, sum skipa fyri sundalagsstevnu, og tað eru Kapp-róðrarfelagið í Hósvík og Bygdarfelagið Varðin, sum hava staðið fyri fyrireikingunum.

Stevnan verður í Hósvík í vikuskiftinum, og fyrstu tiltøkini eru á skránni longu í kvøld, tá lokal feløg og fyritøkur í Hósvík fara at hugna sær við eini fótbóltskapping á sparkivøllinum í bygdini.

Hetta er eitt gott høvi hjá bygdarfólkinum at koma í rætta stevnuhýrin, áðrenn tey mongu tiltøkini fara av bakkastokki í vikuskiftinum. Tá verða ikki stundir til spæl, og tá noyðist stórur partur av bygdini at hjálpa til fyri at fáa alt at hanga saman – á rætta staðnum til røttu tíðina.

Sosialurin hevur gjørt innlegsblað um sundalagsstevnu, og her hava vit bæði nýtt og søguligt tilfar um Hósvíkina og Sunda kommunu annars.

Tað verður Asbjørn Djurhuus, formaður í trivnaðarnevndini í Sunda kommunu, sum fer at seta stevnuna, og tað verður Edvard Hermansen, sum fer at halda midnáttarrøðuna leygarkvøldið.

Hæddarpunktið á sundalagsstevnu er FM-kappróðurin, sum byrjar klokkan 15 leygardagin.

Rás2 fer eisini at seta fokus á Hósvík og Sundalagið í sambandi við stevnuna, og fyrrapartin fríggjadagin verður prát við fólk úr økinum, eitt nú borgarstjóran, Heðin Zachariassen.